# Norðoyastevnuskrá 2004

**Hósdagur 3. juni**

| | |
|---|---|
| 08.00-17.00 | Verkstaðurin á Brekku hevur søluframsýning í Kunningarstovuni. |
| 12.00- | Matstovan hjá Elisabeth Nybo á Viðareiði. Bílegging á tlf 451275/451093 |
| 16.00-22.00 | Kafé KÍ er opin |
| 17.30- | Snarkapping í talvi fyri Børn og Ung í Skákinum á Akursmørk. Steyp verða latin. |
| 18.00- | Vatnskutarar á vánni. Startur við Bátabrúgvarnar. |
| 20.30- | Snarkapping í talvi fyri vaksin í Skákinum á Akursmørk. Steyp verða latin. |
| 21.00-23.00 | Fundur teirra ungu í Betesda. |
| 23.00-04.00 | Ungdóms „Telt" diskotek á P-plássinum við KÍ-høllina. DJ Cool alias Martin Kjærbo skipar fyri. |

**Fríggjadagur 4. juli**

| | |
|---|---|
| 08.00-17.00 | Verkstaðurin á Brekku hevur søluframsýning í Kunningarstovuni. |
| 12.00- | Matstovan hjá Elisabeth Nybo á Viðareiði. Bílegging á tlf 451275/451093 |
| 12.00- | Hotel Norð letur upp. |
| 16.00-22.00 | Kafé KÍ er opin |
| 16.30- | Fótbóltur: Pinkukapping ( 10 dystir ) |
| 17.00-04.00 | Klaksvíkar Klubbi hevur opið hús. |
| 18.00-23.00 | Barok hevur opið hús. |
| 18.00-04.00 | Fortuna hevur opið hús. |
| 18.00- | Fótbóltur: Gentur 10-12 kapping ( 6 dystir ) |
| 18.00- | Vatnskutarar á vánni. Startur við Bátabrúgvar. |
| 18.30- | Stórt barnatiltak í KÍ-høllini við Glott og Gleimi, har Hans Michael og Finn syngja og spæla barnasangir. |
| 19.00- | Talvkapping í Vágstúni ella í Skákinum á Akursmørk. Steyp verða latin. |
| 19.00- | Stór Búffa Buffet á Hotel Norð. Nógv ymisk sløg av búffum. Undir borðhaldinum verður undirhald. Bussamband er kl. 18.30 úr Klaksvík og umleið 23.30 av Viðareiði. |
| 19.00-21.00 | KFUM & K-skótarnir skipa fyri KONDIBINGO. Byrja verður uttanfyri KFUM & K. |
| 19.30- | Stevnan verður sett í Vágstúni av Jórun Høgnesen forkvinna í mentunarnevndini. Klaksvíkar Hornorkestur spælir. |
| 20.00-21.00 | Norðoyastevnuteitið. Klaksvíkar Sjónleikarafelag skipar fyri. |
| 20.00-22.00 | Ungdómsguðstænasta í Christianskirkjuni. Kaffihugni í kjallaranum aftaná |
| 20.00-23.00 | Hoppiborgir, Karusel og Fiskidammur við fótbóltsvøllin. NFÍ skipar fyri. |
| 20.00-23.00 | TIVOLI og útsølur við fótbóltsvøllin |
| 20.00-23.00 | KFUM skótarnir hava skjótibreyt og klatrivegg við fótbóltsvøllin. |
| 21.00- | Opið hús í Betesda. |
| 21.00- | "Landaplágur á Palli 2" ( Stór-Konsert í KÍ-høllini við landaplágum og øðrum góðum við Terji Rasmussen, Rani Nolsøe, Niklas Hera og Shaky, Annfinn & Co. Og onnur ). |
| 22.00- | Kafé í KFUM & K |
| 23.00-04.00 | Dansur í Klaksvíkar Klubba. |
| 24.00-04.00 | Countrydansur við sera vælumtókta "Vest & Blus" úr Esbjerg, við okkara egna Hallur Joensen á odda. Eisini upptraðka Cowboy Squaredansarar. |
| 24.00-04.00 | Ungdóms „Telt" diskotek á P-plássinum við KÍ-høllina. DJ Cool alias Martin Kjærbo skipar fyri. |
| 24.00-04.00 | Diskuteque í Barok. Allan Poulsen skipa fyri. |

**Norðoyastevnuaftan 5. juni**

| | |
|---|---|
| 10.00-20.00 | Listaframsýning í Leikalund við Yastrid Gulbrandson og Edward Fuglø |
| 10.00-12.00 | Verkstaðurin á Brekku hevur søluframsýning í Kunningarstovuni. |
| 10.00-15.00 | Royndarkaving á Borðoyavík við Faroe Dive. Tilmelding á tlf. 218929. |
| 11.00- | Vatnskutarar á vánni. Startur við Bátabrúgvarnar. |
| 11.00-23.00 | Barok hevur opið. |
| 11.00-04.00 | Fortuna og Grill & Pizzaria hava opið. |
| 12.00-22.00 | Kafé KÍ er opin |
| 12.00- | Matstovan hjá Elisabeth Nybo á Viðareiði. Bílegging á tlf 451275/451093 |
| 12.30- | Fótbóltur: KÍa-GÍa Smágentur, 1/2vøll. |
| 12.30- | Fótbóltur: KÍb-GÍb Smágentur, 1/2 vøll. |
| 12.00-13.30 | Føroya Bjór renningin byrjar. Runnið verður Skúlav.-Biskupstøðg.-Gerðagøta. Treysti skipar fyri. |
| 12.00 | Renning fyri vaksin (fødd í 1986 ella fyrr). Teinur 5 km. |
| 12.30 | Renning fyri dreingir og gentur 7 ár (fødd í 1997 ella seinni). Teinur 675 m. |
| 12.40 | Renning fyri dreingir og gentur 10 ár (fødd í 1994-1996). Teinur 675 m. |
| 12.50 | Renning fyri dreingir og gentur 13 ár (fødd í 1991-1993). Teinur 1350 m. |
| 13.00 | Renning fyri dreingir og gentur 17 ár (fødd í 1987-1990). Teinur 1350 m. |
| 13.10 | Firmastafett (3 luttakarar, 1 umfar í part. 675 m x 3). |
| 13.20 | Heiðursmerkjahandanin. |
| 13.30- | Fótbóltur: KÍb-TB Piltar. |
| 13.30 | Súkklukapping fyri vaksin: Skúlav.-Gerðag.-Biskupstøðg. Byrjar/endar við Telefonstøðina. |
| 14.30 | Súkklukapping fyri børn: Skúlav.-Gerðag.-Biskupstøðg. Byrjar/endar við Telefonstøðina. |
| 14.00-14.45 | Færøernes Kommando hevur bjargingarroynd á vánni. |
| 14.30-23.00 | Motorsúkklur fyri børn niðanfyri Býráðshúsið. NFÍ skipar fyri. |
| 14.30-23.30 | TIVOLI og útsølur við fótbóltsvøllin |
| 14.30-23.00 | KFUM skótarnir hava skjótibreyt og klatrivegg við fótbóltsvøllin. |
| 14.30-23.00 | Hoppiborgir, Karusel og Fiskidammur við fótbóltsvøllin. NFÍ skipar fyri. |
| 15.00 | Kappróður: Beint eftir róðurin verða steypini handað í Klaksvíksgarðinum av Jákup Mikkelsen, løgtingsmanni. |
| 15.30- | Fótbóltur: KÍ-VB Gentur. |
| 16.00-20.00 | Verkstaðurin á Brekku hevur søluframsýning í Kunningarstovuni. |
| 16.30- | Fótbóltur: KÍa-EB/Streymur 4. deild. |
| 17.00-22.00 | Norðoya Listafelag hevur framsýning í skúlanum við Ósanna. |
| 18.00-19.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. |
| 18.00-21.00 | Skúlaskipið "Dragin" hevur "opið skip" við Varpabrúnna (sunnan fyri ferguleguna). |
| 18.00-23.30 | Klaksvíkar Klubbi hevur opið hús |
| 18.30- | Fótbóltur: KÍ-VB 2. deild. |
| 19.00 | Talvkapping ímillum Klaksvíkar Talvfelag og Tórshavnar Talvfelag í Skákinum á Akursmørk. |
| 19.00-22.00 | Eydnuhjól og Kafé í Skálanum. Bygdafelagið Sigursglæman skipar fyri. |
| 20.00-21.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. |
| 21.00 | Ungdómsmøti í KFUM & K við Øssur Kjølbro. Gospelkórið Gleði syngur. |
| 21.00 | Samkoman í Betesda hevur útifund í Vágstúni. |
| 22.00 | Soli Deo Gloria hevur lovsongsløtu í Vágstúni |
| 23.30 | Klaksvíkar Hornorkestur spælir í Vágstúni. |
| 24.00 | Midnáttarsamkoma. Kyndlagonga kemur í Vágstún, har Torbjørn Jacobsen, tingmaður flytur fram røðu. Aftaná verður fýrverkarí á Vágsbø og felagssangur. |
| 24.00-04.00 | Ungdóms „Telt" diskotek á P-plássinum við KÍ-høllina. DJ Cool alias Martin Kjærbo skipar fyri. |
| 24.00-04.00 | Discoteque í Barok. Martin Kjærbo skipa fyri. |
| 24.00-04.00 | Countrydansur við sera vælumtókta "Vest & Blus" úr Esbjerg, við okkara egna Hallur Joensen á odda. Eisini upptraðka Cowboy Squaredansarar. |
| 00.30- | Føroyskur Dansur í Skálanum. Klaksvíkar Dansifelag skipar fyri. |
| 01.00-04.00 | Dansur í Klaksvíkar Klubba. |
| 01.00- | Opið hús, tónleikacafé við livandi tónleiki í KFUM & K. |

**Norðoyastevnudag 6. juni**

| | |
|---|---|
| 10.00 | Betesdakórið syngur í Vágstúni. |
| 11.00 | Gudstænasta í Christianskirkjuni. |
| 12.00-18.00 | Barok hevur opið. |
| 12.00-04.00 | Fortuna og Grill & Pizzaria hava opið. |
| 12.00- | Matstovan hjá Elisabeth Nybo á Viðareiði. Bílegging á tlf 451275/451093 |
| 12.30 | Sunnudagsskúli í Betesda. |
| 12.30- | Fótbóltur: KÍ-FSVágar Kvinnur. |
| 12.30-22.00 | Kafé KÍ er opin |
| 14.00 | Skrúðgonga við Klaksvíkar Hornorkestri, skótum, hestum og ítróttarfólki á odda, fer úr Klaksvíksgarðinum heim í Vágstún, har Gestur Hovgaard formaður í K.Í. flytir fram røðu. Klaksvíkar Hornorkestur spælir. |
| 14.00-22.00 | Motorsúkklur fyri børn niðanfyri Býráðshúsið. NFÍ skipar fyri. |
| 15.00-16.00 | Fólkalívsmyndir við Fótbóltsvøllin. Norðoya Fornminnafelag skipar fyri. |
| 15.00- | Vatnskutarar á vánni. Startur við Bátabrúgvarnar. |
| 15.00-24.00 | TIVOLI og útsølur við fótbóltsvøllin |
| 15.00-24.00 | KFUM skótarnir hava skjótibreyt og klatrivegg við fótbóltsvøllin. |
| 15.00-24.00 | Hoppiborgir, Karusel og Fiskidammur við fótbóltsvøllin. NFÍ skipar fyri. |
| 15.00-16.00 | Barnasang Kafé í KFUM & K. |
| 15.00-22.00 | Norðoya Listafelag hevur framsýning í skúlanum við Ósanna. |
| 15.00-20.00 | Listaframsýning í Leikalund við Yastrid Gulbrandson og Edward Fuglø |
| 16.00-18.00 | Fótbóltur: 1. deild menn, KÍ-Skála, landskapping/steypadystur. |
| 16.00-22.00 | Eydnuhjól og Kafé í Skálanum. Bygdafelagið Sigursglæman skipar fyri. |
| 16.00-21.00 | Skúlaskipið "Dragin" hevur "opið skip" við Varpabrúnna (sunnanfyri ferguleguna). |
| 16.00-20.00 | Verkstaðurin á Brekku hevur søluframsýning í Kunningarstovuni. |
| 17.00- | Mat & Køkutombola í norðaru fimleikarhøllini. Stuðulsfelagið "Dragin" skipar fyri. |
| 17.00 | Møti í Soli Deo Gloria. |
| 18.00 | Møti í Emmaus. |
| 18.00-19.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. |
| 18.00 | Møti í KFUM & K. |
| 19.00 | Sangmøti í Betesda. |
| 20.00-21.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. |
| 21.00 | Samkoman í Betesda hevur útifund í Vágstúni. |
| 21.00 | Ungdómsmøti í Emmaus. |
| 23.00-04.00 | Ungdóms „Telt" diskotek á P-plássinum við KÍ-høllina. DJ Cool alias Martin Kjærbo skipar fyri. |
| 24.00-04.00 | Discoteque í Klaksvíkar Klubba. |
| 24.00-04.00 | Discoteque í Barok. Bogi Joensen skipar fyri. |

**Mánadagurin 7. juni**

| | |
|---|---|
| 08.00-17.00 | Verkstaðurin á Brekku hevur søluframsýning í Kunningarstovuni. |
| 20.00-21.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. |

**Týsdagur 8. juni**

| | |
|---|---|
| 08.00-17.00 | Verkstaðurin á Brekku hevur søluframsýning í Kunningarstovuni. |
| 19.30- | Konsert í Ósaskúlanum við 17. sangarum, Moniku Stauss Joensen og Helgu H. Gerðalíð. Eisini verða myndir vístar frá ferðini til Sveits |
| 20.00-21.00 | Norðoyastevnuteitið í Atlantis. |

*Við Tivoli verður ein lítil pallur gjørdur, har ymiskt undirhald verður. Skráin verður í bløðunum í komandi viku*

***Norðoya Frítíðar- og Ítróttarráð vilja við hesum ynskja øllum vælkomnum á Norðoyastevnu.***

**NORÐOYA FRÍTÍÐAR- OG ÍTRÓTTARRÁÐ**



# Heimastýrini fegnast







*Eftir seks strævin ár í landsstýrinum, mugu Karsten Hansen, Anfinn Kallsberg og Eyðun Elttør nú venja seg við eina róligari tilveru*

*Mynd: Savnsmyndir*

**Setanarrøðurnar og slipsaknútarnir eru skift út við hamaran og arbeiðsklæðini. Fyrrverandi landsstýrismenninir úr Norðoyggjum, Anfinn Kallsberg, Karsten Hansen og Eyðun Elttør, hava seinastu mánaðirnar vant seg við nýggju tilveruna eftir seks ár í landsstýrinum. Og tað er ikki frítt, at konurnar fegnast um, at menninir eru meira heima**

EXIT-LANDSSTÝRIÐ

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Ágangandi fjølmiðlar. Setanarrøður og aðrar almennar uppgávur. Evstu ábyrgd av eini stórari umsiting, og dagliga trýstið at vera í andglettinum

Uppgávurnar hjá einum landsstýrismanni nýtast norðoyingarnir Anfinn Kallsberg, Karsten Hansen og Eyðun Elttør ikki at hugsa stórvegis um longur. Eftir seks ár í heitum landsstýrissessum, eydnaðist hvørgum teirra at halda fram í landsstýrinum eftir løgtingsvalið 20. januar.

Teir tríggir hava síðan løgtingsvalið verið noyddir at venja seg við tilveruna uttanfyri almenna leikpallin, og tað er ymiskt, hvat teir nýta fríløturnar til.

Allir eru hjartaliga samdir, tá teir verða spurdir, um hýrurin við hús er batnaður, síðan teir góvust í landsstýrinum.

– Konan gleddist sjálvandi við mær í arbeiðinum sum landsstýrismaður, men hon er sjálvandi fegin um, at eg nú eri meira við hús. Tað er ikki bert ein broyting fyri meg, at eg ikki longur eri landsstýrismaður, men dagligdagurin hjá henni er eisini broyttur, greiða Eyðun Elttør og Karsten Hansen frá.

Anfinn Kallsberg greiðir frá, at sama skilið er á Viðarreiði. Konan hjá fyrrverandi løgmanni fegnast um nýggju tilveruna, og at maðurin er komin av almenna leikpallinum, har hann mangan var í andglettinum sum løgmaður.

## Smíðja og gera garð

Anfinn Kallsberg og Karsten Hansen eru framvegis virknir tinglimir, meðan tað ikki eydnaðist Eyðuni Elttør at vinna sær ein tingsess eftir valið í januar.

Tinglimirnir greiða frá, at nakað av tíð fer sjálvsagt til tingarbeiðið, men tað skert kortini ikki burtur, at fríløturnar til onnur ítriv røkka betur, enn tá teir vóru landsstýrismenn. Og nakað av tíð fer tí við tingarbeiði.

– Endiliga havi eg møguleikan at fáast við ítriv, ið tíðin ikki rakk til, tá eg var løgmaður. Eg eri ikki noyddur at gera ætlanir eftir einum kallendara, og hetta kennist ómetaliga væl. Meginparturin av tíðini verður nýtt í náttúruni, greiðir Anfinn Kallsberg frá. Karsten Hansen hevur havt úr at gera við smíðja í Mikladali, og eisini hevur hann nakað av seyði at hyggja til. Hann sigur seg altíð hava dámt kropsligt arbeiði, og hann tímir ikki at ganga fyri einki.

Eftir ætlan skal Eyðun Elttør byrja í sínum borgarliga starvið á Arbeiðseftirlitinum 1. september í ár.

– Eg havi verið í gongd við at rigga ein garð til uttan fyri húsini, og tað er nógv tíð farin við. Eg havi eisini gjørt eina trappu, so eg havi ikki gingið fyri einki, síðan eg fór landsstýrinum, fortelur Eyðun Elttør.

## Ymiskir á máli

Spurdir, um teir sakna resið av at vera landsstýrismaður, eru teir tríggir norðoyingarnir eitt sindur ójavnir á máli. Anfinn Kallsberg hevur drúgvastu royndirnar í føroyskum politikki av teimum trimum, og honum dámar væl nýggju tilveruna.

– Nei, eg kann ikki siga, at eg sakni resið. Seinastu 8 árini havi eg verið noyddur at skipað meg eftir einum kalendara, og nú kann eg longu fara í summarfrí. Hetta kennist rættiliga avstreingjandi, fortelur Anfinn Kallsberg.

Eyðun Elttør og Karsten Hansen siga seg báðir sakna landsstýrisarbeiðið. Báðum dámdi ómetaliga væl avbjóðingina at vera landsstýrismaður, og hóast tað er gleðiligt, at tíðin í dag røkkur til annað enn politikk, var tað við einum farra av sorgblídni, at teir máttu veittra landsstýrissessinum farvæl.

Teir fegnast allir um nýggju tilveruna eftir seks strævin, men spennandi ár í Føroya Landsstýri.

## Politiskir røðarar



Ikki kann annað sigast enn, at politikkararnir fara at seta tsín dám á norðoyastevnuna í ár. Bert norðoyastevnudag verður tað ikki ein politikkari, sum fer at standa á palli og røða.

Tað verður Jórun Høgnesen, forkvinna í mentunarnevndini í Klaksvíkar býráð, sum fer at seta norðoyastevnuna 2004 úti í Klaksvíksgarðinum fríggjakvøldið klokkan 19.30. Har fer Klaksvíkar hornorkestur eisini at spæla nøkur løg.

Eftir kappróðurin norðoyastevnuaftan fer Jákup Mikkelsen, løgtingsmaður at handa steyp og heiðursmerki.

Midnáttarrøðuna í ár fer Torbjørn Jacobsen, tingmaður at halda, og sum vanligt spælir hornorkestrið í ein hálvan tíma undan røðuni. Eftir midnáttarsamkomuna verður stórt fýrverkarí á Vágsbø og felagssangur í Vágstúni. Norðoyastevnudag fer skrúðgonga við hornorkestri, skótum, hestum og ítróttarfólki úr Klaksvíksgarðinum heim í Vágstún, har Gestur Hovgaard, formaður í KÍ, fer at flyta fram røðu.

## List og mentan á Norðoyastevnu



Aftur í ár hevur Norðoyastevnan hópin at bjóða teimum mentanaráhugaðu við bæði framsýningum og livandi mentanartiltøkum. Norðoyastevnuaftan kl. 17.00 letur stóra og fjølbroytta listaframsýningin hjá Norðoya Listafelag upp í Ósaskúlanum, har bæði kend og minni kend listafólk sýna fram.

Norðoyastevnuaftan kl. 10.00 letur eisini listaframsýning upp í hugnaligu hølunum í Leikalund úti í Klaksvík. Edward Fuglø sýnir fram málningar, og eisini verður høvi at síggja vatnlitsmyndir hjá Yastrid Gulbrandsson.

Í hølunum beint við síðuna av fer Norðoya Fornminnasavn aftur í ár at sýna fram forvitnislig forminni. Framsýningin er opin frá kl. 17.00-21.00 norðoyastevnuaftan og norðoyastevnudag.

Sum nakað serliga forkunnugt hevur Norðoya Fornminnafelag eisini áhugaverdu Fólkalívsmyndirnar á skránni í ár. Tey, ið kundu hugsað sær at sæð, hvussu vit føroyingar vóru ílatnir, livdu og arbeiddu í gomlum døgum, hava nú møguleikan, um tey leita sær niðan á fótbóltsvøllin norðoystevnudag millum 15.00 og 16.00.

Aftaná Fólkalívsmyndirnar kunnu fólk spáka sær ein túr niðan í svimjihøllina, har RC-felagið hevur framsýning av modelskipum. Har verður eisini filmsýning og børnini fáa møguleika at sigla. Framsýningin hjá RC felagnum letur upp kl. 16.00.

Og eins og í fjør hevur skúlaskipið Dragin "opið skip" við Varpabrúnna, har høvi er at støkka umborð norðoyastevnuaftan millum 18.00 og 21.00.

**- ave –**